num av fólki úr øllum heimi, men sum føroying kann ein til tí›ir kenna seg lítlan, tí eingin kennir okkara oyggjar, sta›festir Sigrun.

Batman í kappa

Um sjálva útbúgvingina sigur Sigrun, at hon fer fram á fakulitetinum, sum hon eisini ger ta› á ø›rum universitetum. Har eru fyrilestrar, naka› av bólkaarbei›i og eisini er veglei›ing í ein tíma um vikuna.

Minst ein uppgáva er um vikuna, og er henda uppá 2000 or›.

Tey lesandi eru kn‡tt at skúlanum í 3 fer›irnar 8 vikur árliga.

- Tá er sera nógv arbei›i. Ikki øll klára alt hesar vikurnar, men so er ein lesifrítí› uppá 5 vikur. Tá megna tey flestu at innheinta ta›, i› tey ikki klára›u. Ta› er gjørligt at klára alt uppá 8 vikur, um ein klárar tr‡sti›. Men evnini at hava yvirlit, leggja tilrættis og at vera sjálvstø›ugur eru avgjørt fyrimunur, sigur Sigrun.

Spurd, um ta› er rætt, sum óiva› mong halda, at ein gamal unirversitetsb‡ur sum Cambridge, bert eru gamlir, gráir bygningar og traditiónir, sigur Sigrun, at hetta er ikki allur sannleikin.

- Ta› er væl blanda› vi› yngri, n‡mótans og eldri bygningum. Hitt vi› tí gamla er kanska ein fordómur, men vil ein hava tær stóru traditiónirnar, so fær ein ta›, um ein velur solei›is, sigur Sigrun.

Í hesum sambandi kann nevnast, at sum í helst øllum skúlaskapi í Onglandi, so eru ey›kennisbúnar enn vi› í myndini. Tey lesandi fáa t.d. ein kappa. Seinni ein kraga og sí›ani hattin og so framvegis. Sigrun hevur ein kappa. Hvørja viku er møguligt at fara til ein døgur›a, har ein skal vera í kappanum. Hetta er tó upp til hvønn einstakan og ta› er ikki krav at fara til hesa máltí›.

(Í flokshølinum) Sigrun og onnur lesandi til roynd

- Eg plagi at siga, at eg kenni meg sum Batman í hasum kappanum, sigur Sigrun og leggur afturat, at á onkrum college hava tey sagt nei til at n‡ta henda búnan.

Samband og Sosialin á netinum

Sigrun og familjan er fegin um, at telduposturin nærum er hvørsmans ogn nú.

-Sigrun dylir ikki, at ta› eru stundir, har henni kann leingjast heim. Men hon heldur tó, at ta› er sera hent vi› teldupostinum og vi› Sosialinum á internetinum, tí skuldi hon fingi› sjálvt bla›i›, høvdu tí›indini veri› gomul.

Og hesum er mamman, Ebba Vágheim, samd vi› henni í. Hon er nú komin inn í stovuna vi› kaffi.

- Sambandi› er ikki, sum tá tú var og fjakka›i, minnir hon Sigrun á.

Og so sigur Sigrun frá um fjakkarafer›ina í Nepal, India, Kina, Russlandi, Hong Kong og a›rasta›ni. Tá hon einafer› skuldi senda eitt bræv heim, var posthúsi› tiki› ni›ur. Ta› sama var galdandi, tá ein fer›ase›il skuldi keypast.

Men at føroyingar eru væl fyri og hava gó›a barlast í familjuni, eru tær bá›ar samdar um.

Og brátt skal Sigrun aftur avsta› úr Vági og alla lei›ina yvir til Cambridge. Men ein troyst er tá, at nærum dagliga kemur ein teldupostur til Cambridge úr Vági, og ta› tekur honum ikki langa tí› at fer›ast, so fjarstø›an tykist óiva› minni orsaka› av hesum.

Sigrun vónar at síggja føroyingar í Cambridge í framtí›ini og heitir á áhuga›ar føroyskar pisur, um at gera eina roynd. Og Sigrun sigur seg vera til rei›ar at koma vi› veglei›ing, um ivamál eru.

Ein fríløta í vakra umhvørvinum í Cambridge

Køksentri›

Vit hava teir væl umtóktu KVIK-køkarnar og ba›irúmsmøblarnar

- Skal køkurin skiftast út?
- N‡tt ba›irúm?
- N‡tt bryggers?
- N‡tt klædnaskáp?

So eru vit til rei›ar at geva tær eitt gott tilbo›. Ring 212490 ella 312480 og avtala tí› vi› okkum.

Køksentri›

Tel. 212490 og 313480

Sosialurin - 311820